KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 28.01.2021 kl. 17:30

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
1/21	21/00068-5	Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið - Óli M. Lassen
2/21	20/01343-1	Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar
3/21	20/01188-27	Val av umboðum í ymsar nevndir, ráð, grunnar og stýri
4/21	21/00009-1	Heilsunevnd fyri valskeiðið 2021-2024 – E&B og UBN – *fyrra viðgerð*
5/21	21/00152-1	Broyting í kommunustýrisskipanini - rakstrarstaðið "Frítíðarskúlin (Snjallabjalla)" flytast frá FíN til B&U – *fyrra viðgerð*
6/21	21/00037-2	Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 797a til ummælis
7/21	17/00520-24	Dagføring av spæliplássinum við Kráargøtu
8/21	20/00840-79	Flyta játtan til stuðulskonturnar á trivnaðarøkinum – *fyrra viðgerð*
9/21	17/01446-7	Talgildu Føroyar - Klaksvíkar kommuna gerast samstarvsfelagi? – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
10/21	20/01234-10	Treytað tilsøgn um leigusáttmála til íbúðabygging í miðbýnum
11/21	18/00023-1	Umfígging (avtala um afturgjalding, januar 2021)

Til viðgerðar

1/21
21/00068-5 Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið - Óli M. Lassen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	1/21

21/00068-5 Býráðslimi berst frá at røkja býráðsarbeiðið - Óli M. Lassen

Frágreiðing um málið:
Óli M. Lassen, býráðslimur, hevur tann 10. januar 2021 boðað borgarstjóranum frá, at hann ikki fær røkt býráðsarbeiðið frá 10. januar 2021 og einar tveir mánaðir fram.
Næstvaldur á valevnislistanum er Andreas Josephsen.

Lógargrundarlag:
- Kommunustýrislógin § 18, stk. 2

Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.

- Reglugerð fyri innkalling av varalimum í býráðið og føstu nevndir býráðsins, § 6 (Langtíðar frávera), frá 22. mars 2011

  Um býráðslimur fær forfall ella søkir um farloyvi í eitt tíðarskeið, sum er longri enn 2 mánaðar, tekur næsti persónur á viðkomandi vallista sæti bæði í býráðnum og sum limur/varalimur í teimum nevndum, har býráðslimurin, sum fer í farloyvi, er limur/varalimur.

  Eru ongar orsøkir til iva um heimildina fyri einum langtíðar farloyvi, kann borgarstjórin skipa fyri, at næsti persónur á viðkomandi vallista tekur sæti í bæði nevndum og býráði fyri býráðslimin í farloyvi, og síðan verður farloyvið eftirfylgjandi lagt fyri fyrst komandi býráðsfundin til samtyktar og staðfestingar.

  Um tað hinvegin eru orsøkir til iva um onkur viðurskifti í sambandi við umsóknina um langtíðar farloyvi, verður bíðað við at kalla næsta persón á viðkomandi vallista inn í sambandi við nevndarfundirnar, til málið um farloyvið er viðgjørt og samtykt av býráðnum. Eftir tað tekur vara-býráðslimurin sæti í bæði nevndum og býráði fyri býráðslimin í farloyvi.

Tilmæli:
Av tí at ongar orsøkir vóru til iva um heimildina fyri eini langtíðar fráveru hjá Óla M. Lassen, hevur Andreas Josephsen longu tikið sæti í teimum nevndum, ið Óli M. Lassen hevur sæti í, vísandi til 2. reglubrot í § 6 í reglugerðini fyri innkalling av varalimum í býráðið og føstu nevndirnar.
Fráveran verður tí nú løgd fyri býráðið til samtyktar og staðfestingar.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Einmælt samtykt og staðfest, at Andreas Josephsen tekur sæti í nevndum og býráð fyri Óla M. Lassen, meðan hesum berst frá at røkja býráðsarbeiðið.

2/21
20/01343-1 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.01.2021	2/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	2/21

20/01343-1 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar

Frágreiðing um málið:
Í samband við at nýggjur borgarstjóri og varaborgarstjóri hava tikið við 1. jan. 2021 skal reglugerðin um fulltrú til kommunalar bindingar dagførast (sí viðhefta uppskot til dagførda reglugerð).

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 44, stk. 2: ”*skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess*”.
Sambært viðmerking til omanfyrinevndu lógargrein “*skal kommunustýrið tilnevna persónliga og við navns nevni medundirskrivaran hjá borgarstjóranum. Starvsheitið er ikki nøktandi*”.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við dagførdu reglugerðini.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

3/21
20/01188-27 Val av umboðum í ymsar nevndir, ráð, grunnar og stýri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	3/21

20/01188-27 Val av umboðum í ymsar nevndir, ráð, grunnar og stýri

Frágreiðing um málið:
Býráðið skal velja umboð í ymsar nevndir, ráð, grunnar og stýri.
Niðanfyri er eitt yvirlit yvir, hvørji valt verður í á fundinum 28. januar 2021.

Ferðslunevndin	Tekniski Skúlin í Klaksvík
Staðbundin nevnd fyri Árnafjørð	Ferðavinnan í Norðoyggjum
Staðbundin nevnd fyri Mikladal	Norðoya Fornminnasavn
Staðbundin nevnd fyri Trøllanes	Klaksvíkar Tónlistaskúli
Staðbundin nevnd fyri Svínoy	Umlættingarheimið Dáin
Staðbundin nevnd fyri Norðoyri	Dr. Margrethu Barnagarður
Staðbundin nevnd fyri Ánirnar	Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku
Staðbundin nevnd fyri Húsar	Húsarhaldsskúli Føroya
Staðbundin nevnd fyri Syðradal	Skúlastýrið á Skúlatrøð
Valnevndin	Skúlastýrið Húsum/Syðradali
Valstýrið - Klaksvík (býráðs-, løgtings- og fólkatingsval)	Norðoya Bú- og Heimatænasta
Valstýrið – Árnafjørður	Fjarlestrardepilin í Klaksvík
Valstýrið – Svínoy	Íverksetarahúsið
Valstýrið – Syðradalur/Húsar	Vinnuligi útbúgvingargrunnurin
Valstýrið – Mikladalur/Trøllanes	Mentanarhúsið í Klaksvík
Barnaverndarnevndin	Spinnaríið
Gøtunavnanevndin	Tilbúgvingarnevndin
Kirkjugarðsnevndin	SEV
Hegn- og vatnsýnisnevndin	IRF
Klaksvíksgrunnurin	Kommunufelag Føroya
Skattakærunevndin fyri Norðoya øki	Grindaformenn fyri Klaksvíkar hvalvág

Víst verður annars til *Val av limum í nevndir, ráð, grunnar og stýri - undirskjal til tilmæli – 21-01-2021*, ið meiri útgreiðnað greiðir frá, hvussu mong umboð skulu veljast.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

Tilmæli:
Býráðið verður at velja umboð í tey í yvirlitinum nevndu nevndir, ráð, grunnar og stýri.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Ferðslunevndin
Heimild: § 39, 1. petti í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / *Ferðslunevndin, sum er ein faknevnd innan tekniska málsøkið, er mannað við trimum limum og verður vald á fyrsta býráðsfundi eftir hvørt býráðsval við einum umboð fyri býráðið (býráðslimur), einum umboð fyri Teknisku Umsiting og einum umboð fyri løgregluna.*

Tilmæli: veljast skal 1 býráðslimur, 1 umboð fyri teknisku umsiting og 1 umboð fyri løgregluna

Samtykt: Oddmar á Lakjuni, býráðslimur; Óla Jákup Bech, umboðandi teknisku fyrisiting; Jan Poulsen, løgreglumaður, umboðandi Løgregluna.

Staðbundin nevnd fyri Árnafjørð
Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §30 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Árnafjarðarnevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum í Árnafirði verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar í Árnafirði eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Árnafjørð, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Óli M. Lassen – Tiltakslimur: Jógvan Skorheim

Staðbundin nevnd fyri Mikladal
Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §31 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Mikladalsnevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum í Mikladali verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar í Mikladali eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í

staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Mikladal, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Jógvan Skorheim – Tiltakslimur: Óli M. Lassen

Staðbundin nevnd fyri Trøllanes
Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §32 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Trøllanesnevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum á Trøllanesi verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar á Trøllanesi eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Trøllanes, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Jógvan Skorheim – Tiltakslimur: Óli M. Lassen

Staðbundin nevnd fyri Svínoy
Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §33 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Svínoyarnevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum í Svínoy verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar í Svínoy eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Svínoy, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Tummas J. Lervig – Tiltakslimur: Signhild V. Johannesen

Staðbundin nevnd fyri Norðoyri

Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §34 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Norðoyrarnevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum á Norðoyri verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar á Norðoyri eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Norðoyri, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Tummas J. Lervig – Tiltakslimur: Signhild V. Johannesen

Staðbundin nevnd fyri Ánirnar

Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §37 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Ánanevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum í Ánunum verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar í Ánunum eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Ánirnar, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Óli M. Lassen – Tiltakslimur: Jógvan Skorheim

Staðbundin nevnd fyri Húsar

Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §35 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Húsanevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum á Húsum verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar á Húsum eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan

áhuga fyri Húsar, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Signhild V. Johannesen – Tiltakslimur: Tummas J. Lervig

Staðbundin nevnd fyri Syðradal
Heimild: §37 í KSL / Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum. *Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan. ... *Stk. 5.* Kommunustýrislimur kann ikki samstundis vera staðbundið umboð.

Heimild: §36 í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / Syðradalsnevndin, 1. petti. At taka sær av áhugamálum á Syðradali verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar á Syðradali eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum eru búsitandi í staðbundna økinum og hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður. 2. petti. Mál, sum býráðið metir at hava serligan áhuga fyri Syðradal, verða send nevndini til ummælis, sum innan ein mánað, vegleiðir, umrøður og ger tilmæli.

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð fyri býráðsminnilutan

Samtykt: Limur: Signhild V. Johannesen – Tiltakslimur: Tummas J. Lervig

Valnevndin
Heimild: Ll. nr. 44, 1972, §3 (Kommunuvallógin) / *Valið verður fyrireikað og fyriskipað undir leiðslu av eini valnevnd, sum sett er av bygda(r)ráðnum/býráðnum. Nevndin hevur í minsta lagi 3 limir og skipar seg sjálv. Nevndin sitir sama tíðarskeið sum bygdarráðið/býráðið.*

Tilmæli: veljast skulu 5 limir

Samtykt: Petur í Gong, Sunnuva B. Jacobsen, Svanhild Isaksen, Maria Isaksen og Sámal Mikkelsen

Valstýrið - Klaksvík (býráðs-, løgtings- og fólkatingsval
Heimild: Ll. nr. 44, 1972, §8, stk. 3 (Kommunuvallógin) / *...verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygda(r)ráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall.*

Heimild: Ll. 49, 1978, § 20, stk. 1 (Løgtingsvallógin) / *Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. ... Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt.*

Heimild: Lov 458, 1993, § 19 (Fólkatingsvallógin) / *Senest når valg er udskrevet, vælger kommunalbestyrelsen for hvert valgdistrikt mindst 3 og højst 5 valgstyrere til at forestå afstemningen og stemmeoptællingen på valgstedet.*

Tilmæli: veljast skulu 5 limir

Samtykt: Edna Thomsen, Ragnar Joensen, Edna R. Steinberg, Jensa Anthoniussen og Maria Thorsteinsson

Valstýrið - Árnafjørður
Heimild: Ll. nr. 44, 1972, §8, stk. 3 (Kommunuvallógin) / *...verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygda(r)ráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir og 1 tiltakslimur

Samtykt: Limir: Guttorm F. Pállson, Theodor A. Olsen og Charlotta Thorsteinsson – Tiltakslimur: Regin Hansen

Valstýrið - Svínoy
Heimild: Ll. nr. 44, 1972, §8, stk. 3 (Kommunuvallógin) / *...verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygda(r)ráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir og 1 tiltakslimur

Samtykt: Limir: Hanna Jacobsen, Petur Danielsen og Óli á Geilini – Tiltakslimur: Símun Hansen

Valstýrið – Syðradalur/Húsar
Heimild: Ll. nr. 44, 1972, §8, stk. 3 (Kommunuvallógin) / *...verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygda(r)ráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir og 1 tiltakslimur

Samtykt: Fríða Isaksen, Guðrun Bláskor og Elin Syderbø – Tiltakslimur: Páll Sørensen

Valstýrið – Mikladalur/Trøllanes
Heimild: Ll. nr. 44, 1972, §8, stk. 3 (Kommunuvallógin) / *...verður í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har. Hesi valstýri verða sett av bygda(r)ráðnum/býráðnum eftir vanligum reglum fyri val av nevndum (lutfalsvalháttur). Valstýrið, sum skal hava í minsta lagi 3, í mesta lagi 9 limir, skipar seg sjálvt. Eingin veljari kann bera seg undan vali til valstýrara, uttan so at hann hevur lógligt forfall.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir og 1 tiltakslimur

Samtykt: Limir: Danial Eliassen, Anja Eliassen og Herfrí J. Sørensen – Tiltakslimur: Christian Andreasen

Barnaverndarnevndin
Heimild: Ll. nr. 18, 2005 Barnaverndarlógin, §4. stk. 1-4 / *§4 Kommunurnar skulu seta barnaverndarnevndir. Kommunurnar skulu samstarva við aðrar kommunur um val av barnaverndarnevndum sbrt. stk. 5. Barnaverndarnevndirnar verða valdar av kommunustýrunum. Stk. 2. Í eini barnaverndarnevnd skulu vera í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir. Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu í minsta lagi hava eina viðkomandi miðallanga útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- ella bygdarráð og hava reina revsiváttan. Stk. 3. Barnaverndarnevndin verður vald eftir kommunuval fyri valskeiðið, sum kommunustýrið situr. Barnaverndarnevndin velur sjálv formann og næstformann. Stk. 4. Kommunustýrið kann lata stýrinum í sínum kommunufelagsskapi heimildina at velja eina felags barnaverndarnevnd, sum er galdandi fyri meira enn eina kommunu.*

Heimild: §5 í Samstarvsavtalu millum kommunur í Norðoyggjum um barnaverndarøkið, 04-01-2012 / *Nevndin hevur í mesta lagi 5 limir og verður vald av nýggjum eftir hvørt kommunuval. Býtið av limum er hetta: • Viðareiðis kommuna velur 1 lim og Fugloyar kommuna velur 1 varalim, • Hvannasunds kommuna velur 1 lim og 1 varalim, • Kunoyar kommuna velur 1 lim og Húsa kommuna velur 1 varalim, • Klaksvíkar kommuna velur 2 limir og 2 varalimir*

Tilmæli: veljast skulu 2 limir og 3 tiltakslimir

Samtykt: Limir: Jórun Høgnesen og Petur Martin Hansen – Tiltakslimir: Herfrí J. Sørensen, Gunnvá Tróndardóttir og Harriet Hvidbro Johannesen

Gøtunavnanevndin
Heimild: § 38, 2. petti í Kommunustýrisskipanini frá 26. okt. 2017 / *Gøtunavnanevndin hevur 3 fastar limir, ið veðra valdir av býráðnum fyri eitt 4 ára skeið í senn aftan á hvørt býráðsval.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir

Samtykt: Andras Sólstein, Edward Fuglø og Paulina Andreasen

Kirkjugarðsnevndin
Heimild: Rg. fyri kirkjugarðarnar í Kk frá 1. apríl 1996, §2 / *• Í nevndini sita 5 limir; kirkjuráðið í Klaksvík velur 2 limir, og býráðið fyri Klaksvíkar kommunu velur 3 limir, • Valskeiðið er 4 ár og fylgir býráðsskeiðinum. Nevndarlimir kunnu verða afturvaldir. Nevndin skipar seg sjálv.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir

Samtykt: Hans Hjalti Skaale, Jona Nielsen og Erikka Elttør

Hegn- og vatnsýnisnevndin
Heimild: § 44, Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred / *For hvert Sogn eller efter Lagtingets Bestemmelse for Dele af et Sogn bliver der at ansætte 3 Hegnssynsmænd. De udnævnes for 4 Aar ad Gangen af Forstanderskabet (i Thorshavn Byraadet). Enhver Jordbruger er pligtig til at modtage Udnævnelse, medmindre han har opnaaet en Alder af 60 Aar. Den, som i mindst 4 Aar uafbrudt har været Synsmand, skal dog ikke være pligtig til at modtage ny Udnævnelse som saadan før efter Udløbet af et lige saa langt Tidsrum som det, hvori han har varetaget dette Hverv. Begærer nogen sig fritaget for at modtage Udnævnelse, afgør Forstanderskabet (Byraadet), hvorvidt hans Begæring kan tages til Følge. Forkastes Undskyldningen, kan den udnævnte forelægge sin Begæring om Fritagelse for Lagtinget.*

Heimild: § 15, Lov nr. 169 af 18. maj 1937 for Færøerne om Benyttelse af Indsøer og Vandløb / *De i denne Lov omhandlede Skøn udføres af de ifølge Hegnslovens § 44 udnævnte Hegnssynsmænd, der i deres Virksomhed for Afgørelse af de i nærværende Lov omhandlede Forhold benævnes Vandsynsmænd.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir og 5 tiltakslimir

Samtykt: Limir: J. Krismar Andreasen, Eyðun Jacobsen og Andras Joensen - Tiltakslimir: Anja Eliassen, Mikkjal Mikkelsen, Jógvan Andreas Sørensen, Andrias P. Eliasen og Jákup Samson.

Klaksvíksgrunnurin
Heimild: §§ 4-5, Viðtøkur fyri Klaksvíksgrunnin / § 4: *Nevndin er hægsti myndugleiki grunnsins. Í nevndini sita 4 limir, sum verða valdir fyri fýra ár, umframt at eyklimir vera valdir. Limirnir kunnu veljast aftur. Nevndin skipar seg sjálv við formanni og næstformanni.* § 5: *Í nevndini sita tvey umboð fyri Mentamálaráðið og tvey umboð fyri Klaksvíkar kommunu. Øll umboðini vera vald, samstundis sum kommunuval er.*

Tilmæli: veljast skulu 2 limir og 2 tiltakslimir

Samtykt: Limir: Atli S. Justinussen og Jógvan Skorheim – Tiltakslimir: Oddmar á Lakjuni og Signhild V. Johannesen

Skattakærunevndin fyri Norðoya øki
Heimild: § 35, 1. petti, Kommunustýrisskipanin + kg. nr. 8, 2009 um val í skattakærunevndir / *Skattakærunevndin hevur 4 limir og 4 tiltakslimir úr Klaksvíkar kommunu, sbrt. kunngerð nr. 8 frá 5. februar 2009 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar. (3. hvørja valsetu hevur Kk 5 limir og 5 tiltakslimir vísandi § 3, 4. pkt. í kunngerðini)*

Tilmæli: veljast skulu 5 limir og 5 tiltakslimir

Samtykt: Limir: Erling Petersen, Ruth Johannesen, Herfrí J. Sørensen, Markus T. á Gravarbø og Per A. Olsen – Tiltakslimir: Símun á Høvdanum, Auðunn Konráðsson, Berit Norðoy, Birgit Sivertsen og Margee Dam

Tekniski Skúlin í Klaksvík
Heimild: §2, stk. 1 og 2, Viðtøkur skúlans / *Stk. 1 Við sjálvsognarstovnin verður valt eitt stýri. Stýrið hevur 6 limir, sum verða valdir fyri 4 ár – valskeiðið gongur frá 1. apríl til og við 31. mars eftir kommunuval. Fyri hvønn stýrislim verður ein varalimur valdur. Stk. 2. Limirnir verða valdir soleiðis: a) Viðkomandi yrkisfeløg á arbeiðsmarknaðinum velja tilsamans 4 limir við javnstórari umboðan av arbeiðsgevarum og løntakarum. Føroya Handverksmeistarafelag velur 2 limir og Føroya Handverkarafelag 2 limir. b) Klaksvíkar kommuna, har skúlin hoyrir heima, velur 1 lim. c) Starvsfólkini á skúlanum velja 1 lim.*

Tilmæli: veljast skal 1 limur og 1 tiltakslimur

Samtykt: Limur: Karl H. Johansen – Tiltakslimur: Atli S. Justinussen

Ferðavinnan í Norðoyggjum
Heimild: § 6 í viðtøkum felagsins frá 30. apríl 2019 / *Nevndin telur 5 limir, sum sita 2 ár í senn. Annaðhvørt ár standa 2 nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa 3 limir fyri vali. Tiltakslimir verða valdir fyri allar nevndarlimir. Klaksvíkar kommuna velur 2 nevndarlimir, annar teirra skal umboða umsiting kommununar, og hin skal umboða mentanarøkið. Hinar kommunurnar í Norðoyggjum velja ein lim. Kommunustýrislimir kunnu ikki í nevndini umboða kommununa, sum teir sita í. Felagið «Ferðavinnan í Norðoyggjum» velur 2 limir, ein umboðandi handilsvinnuna og ein ferðavinnuna. Á ársaðalfundinum í 2019 standa allir nevndarlimir fyri vali. 2 limir verða valdir fyri 1 ár, lutakast avger, hvørjir teir eru. Nevndarlimur, ella tann hann umboðar, skal vera limur í felagnum "Ferðavinnan í Norðoyggjum".*

Tilmæli: veljast skulu 2 limir (annar umboðandi umsiting kommununnar og hin mentanarøkið í kommununi) og 2 tiltakslimir

Samtykt: Limir: Eirikur í Jákupsstovu umboðandi umsiting kommununnar (tiltakslimur: Dávur Winther) og Símun Gullaksen umboðandi mentanarøkið úti í býnum/kommununi (tiltakslimur: Jóhannus Kallsgarð Joensen).

Umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn
Heimild: 5 í viðtøkunum fyri Norðoya Fornminnasavn / *Allar kommunur í Norðoyggjum eru umboðaðar í savninum gjøgnum eitt umboðsráð, sum yvirfyri stjórnini og savninum kunnu reisa síni áhugamál viðvíkjandi savnsvirkseminum. Hetta umboðsráð verður valt soleiðis: Hvør kommuna í Norðoyggjum*

velur eitt umboð við eykaumboð í ráðið. Umboðini verða vald beint eftir, at bygda- og býráðsval hava verið, og sita tey valskeiðið út.

Tilmæli: veljast skal 1 limur og 1 tiltakslimur

Samtykt: Útsett til næsta fund

Klaksvíkar Tónlistaskúli
Heimild: §2 í rg. Fyri Tónlistaskúlan / Nevndin, sum stjórnar skúlanum, er soleiðis mannað: *"*eitt býráðsumboð, sum er formaður í nevndini, verður valt av býráðnum aftan á hvørt býráðsval, galdandi fyri valskeiðið, *eitt foreldraumboð verður valt av foreldrunum við byrjan av hvørjum skúlaári. Skúlin skipar fyri hesum vali. *Triði limurin verður valdur av býráðnum eftir tilmæli frá leiðaranum av skúlanum*". Sostatt skal býráðið sjálvt velja eitt umboð, sum verður formaður í nevndini, og so eitt umboð fyri tónleikalívið í býnum, eftir tilmæli frá leiðaranum fyri skúlan.

Tilmæli: veljast skal 1 limur + 1 limur eftir tilmæli frá leiðara skúlans

Samtykt: Býráðsumboð: Jóhanna C. Christiansen. Umboð eftir tilmæli frá leiðaranum á skúlanum: kemur seinni

Umlættingarheimið Dáin
Heimild: §3 í viðtøkunum fyri Umlættingarheimið Dáan / *Ovasta leiðsla fyri heimið er eitt trímannastýri, ið verður valt soleiðis: (a) Føroya Landsstýri velur ein lim, (b) "Javni – Landsfelagið evnaveikum at bata" velur ein lim, (c) Klaksvíkar Býráð velur ein lim. Stk. 2: Fyri hvønn stýrislim verður valdur ein varalimur.*

Tilmæli: veljast skal 1 limur og 1 tiltakslimur

Samtykt: Limur: Annika Johansen – Tiltakslimur: Jórun Høgnesen

Dr. Margrethu Barnagarður
Heimild: §3 í rg. Fyri Dr. Margrethu Barnagarð / Sjálvsognarstovnurin verður stjórnaður av eini seks-mannanevnd. Nevndarvalið fylgir valskeiðnum hjá bý- / bygdarráðnum. Nevndin er samansett soleiðis: *Bý- og bygdaráðið velur ein lim, *2 limir vera valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Foreldraumboðini kunnu bert vera í nevndini, so leingi tey hava børn á stovninum og vera annað / onnur umboð at velja ístaðin, so skjótt foreldraumboðini ikki longur hava børn á stovninum, *Nevndin í KFUM&K, Klaksvík, velur tríggjar nevndarlimir.

Tilmæli: veljast skal 1 limur og 1 tiltakslimur

Samtykt: Limur: Jóhanna C. Christiansen – Tiltakslimur: Eyðstein Ó. Poulsen

Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku
Heimild: §4 í viðtøkum pr. 20-04-2016 fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku / *Leiðsla sjálvsognarstovnsins er ein nevnd, sum telur 6 limir. Kl. Býráð velur 3 limir [og 3 tiltakslimir], og Bústaðir velur 3 limir. / Stk. 2. Nevndarlimirnir verða valdir eftir hvørt kommunuval í eitt 4 ára skeið. Um nevndarlimir taka seg úr nevndini í einum valskeiði, skulu nýggir nevndarlimir veljast beinanvegin. Teir*

nevndarlimir, sum soleiðis hava tikið við, sita til valskeiðið er úti. Nevndarlimur kann verða afturvaldur. Nevndarlimirnir hava rætt til rímiliga samsýning

Tilmæli: veljast skulu 3 limir og 3 tiltakslimir

Samtykt: Karl H. Johansen, Gunvá við Keldu og Jógvan Skorheim – Tiltakslimir: Atli S. Justinussen og Signhild V. Johannesen

Húsarhaldsskúli Føroya
Heimild: §5 í viðtøkum fyri HSF: *Skúlin verður stjórnaður av eini 5 manna nevnd, ið verður vald soleiðis: *Klaksvíkar Húsmøðrafelag velur 2 nevndarlimir og 2 tiltakslimir, *Klaksvíkar Býráð velur 2 nevndarlimir og 2 tiltakslimir, *Kvinnufelagssamskipan Føroya velur 1 nevndarlim og 1 tiltakslim.*

Tilmæli: veljast skulu 2 limir og 2 tiltakslimir

Samtykt: Limir: Elsa Maria Lorenzen og Hanna Jacobsen – Tiltakslimir: Berit Norðoy og Anja Eliassen

Skúlastýrið á Skúlatrøð
Heimild: Fólkaskúlalógin, § 50, stk. 1-2 / *Eitt skúlastýri skal verða valt til hvønn sjálvstøðugan skúla í kommununi.* Stk. 2. *Í skúlum, sum í minsta lagi hava 20 næmingar og 2 lærarar smb. § 55 stk. 1 eru limir tess: 1) 2 kommunustýrisumboð og 2 persónlig varaumboð, sum taka sæti í skúlastýrinum, tá ið kommunuumboði berst frá. Kommunustýrið velur umboð og varaumboð á fundinum, har nývalda kommunustýrið skipar seg.*

Tilmæli: veljast skulu 2 umboð og 2 varaumboð millum kommunustýrislimirnar

Samtykt: Eyðstein Ó. Poulsen, býráðslimur (varaumboð: Jóhanna C. Christiansen, býráðslimur) og Signhild V. Johannesen, býráðslimur (varaumboð: Tummas J. Lervig, býráðslimur)

Skúlastýrið á Húsum/Syðradali
Heimild: Fólkaskúlalógin, § 50, stk. 3 / *Í skúlum, ið hava færri enn 20 næmingar og bert ein lærara, eru limir tess skúlaleiðarin, tvey foreldraumboð, eitt komunustýrisumboð og eitt varaumboð, sum tekur sæti í skúlastýrinum, tá ið kommunustýrisumboðnum berst frá. Kommunustýrið velur umboð og varaumboð á fundinum, har nývalda komunustýrið skipar seg.*

Tilmæli: veljast skal 1 umboð og 1 varaumboð millum kommunustýrislimirnar

Samtykt: Eyðstein Ó. Poulsen, býráðslimur - varaumboð: Annika S. Biskopstø, býráðslimur

Stýrið fyri Norðoya Bú- og Heimatænasta (NBH)
Heimild: Løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. / § 7. ... Í stýrið verða valdir í minsta lagi 5 limir. Hvør kommuna fær 1 lim og 1 varalim. Borgarstjórin er fyrstvaldi limurin. Í kommunum við fleiri enn 1 limi verða valdir 2 varalimir, fyrsti og annar varalimur. Varalimirnir verða valdir millum kommunustýrislimirnar. / Stk. 2. Kommunur við oman fyri 1000 íbúgvum við ársbyrjan í valárinum fáa 1 lim afturat pr. 1000 íbúgvar. Hesir verða valdir millum kommunustýrislimirnar. / Stk. 3. .... Um talið av stýrislimum er líkatal, fær kommunan við flest íbúgvum ein stýrislim afturat. / Stk. 4. Stýrið verður valt eftir kommunuval fyri valskeiðið, sum kommunustýrið situr. Stýrið velur sjálvt formann og næstformann. Ein av borgarstjórunum í samstarvinum skal vera formaður.

Tilmæli: veljast skulu 6 limir (umframt borgarstjóran, ið er fyrstvaldur) og 2 tiltakslimir (1. og 2. tiltakslimur).

Samtykt: Karl H. Johansen, Atli S. Justinussen, Gunvá við Keldu, Annika S. Biskopstø, Eyðstein Ó. Poulsen, Tummas J. Lervig og Signhild V. Johannesen. 1. tiltakslimur fyri Kl. kommunu: Jóhanna C. Christiansen; 2. tiltakslimur fyri Kl. kommunu: Jógvan Skorheim

Fjarlestrardepilin í Klaksvík
Tilmæli: veljast skulu 2 umboð millum kommunustýrislimirnar umframt 1 umboð (umboðandi skúlaverkið)

Samtykt: Oddmar á Lakjuni og Signhild V. Johannesen. Umboðandi skúlaverkið: Maiken Skarðenni

Íverksetarahúsið
Heimild: §7 í samtyktum fyri ÍVH: *Grunnurin hevur eina trímanna nevnd, sum Vinnumálaráðið, Klaksvíkar Kommuna, og høvuðssponsorurin velja. Landsstýrismaðurin velur formannin millum hesi trý. Eingin nevndarlimur kann sita longur enn í átta ár. Løgtings- og kommunustýrislimir kunnu ikki verða vald í nevndina*.

Tilmæli: veljast skal 1 limur

Samtykt: Nikolas Olsen

Vinnuligi Útbúgvingargrunnurin
Heimild: § 7 í viðtøkunum fyri grunnin: *Grunnurin er sjálvsognarstovnur, ið verður stjórnaður av nevnd við trimum til seks limum, ið verða tilnevndir samsvarandi hesum viðtøkum. Nevndin skipar seg sjálva við formanni. Nevndarlimir verða valdir fyri 4 ár í senn og kunnu veljast aftur. Tá fyrsta 4 ára skeiðið er liðið og fyri framtíðina, velja hesi ávikavist ein lim og ein varalim: 1) Kl. Býráð 2) Kl. Býráð 3) Vinnu- og Ment.deild 4) Vinnan 5) Vinnan 6) Vinnan. Nevndarvalið fylgir valskeiðnum hjá býráðnum. Fer nevndarlimur ella varalimur úr nevndini, áðrenn skeiðið er lokið, velur tann, sum hevur tilnevnt limin, nýggjan lim fyri tað, ið er eftir av skeiðnum. Varalimur kemur á fund í nevndini, tá ið limur hevur forfall. Hevur formaðurin forfall, velur nevndin ein av limunum at virka í formansins stað.*

Tilmæli: veljast skulu 2 limir og 2 varalimir – umframt staðfesting av limum fyri vinnu- og mentanardeildina og 3 limum frá vinnuni

Samtykt: Limir: Atli S. Justinussen og Tummas J. Lervig. Varalimir: Jóhanna C. Christiansen og Óli M. Lassen. Harumframt staðfest, at Eirikur í Jákupsstovu umboðar vinnu- og mentanardeildina

Mentanarhúsið í Klaksvík
Heimild: § 3 í viðtøkunum fyri Mentanarhúsið í Klaksvík / *Grunnurin verður umsitin av einum stýri við 6 limum, sum verða valdir soleiðis: Klaksvíkar Sjónleikarafelag velur ein lim, Norðoya Listafelag velur ein lim, Norðurlandahúsið í Føroyum velur ein lim, og Klaksvíkar Býráð velur tveir limir, og borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu. Limirnir verða valdir fyri 4 ár í senn aftaná eitt býráðsval. Stýrið skipar seg sjálvt við formanni.*

Tilmæli: veljast skulu 3 limir, harav tann eini er borgarstjórin

Samtykt: Limir: Karl H. Johansen, borgarstjóri, Jógvan Skorheim og Jóhanna C. Christiansen

Spinnaríið
Heimild: § 5 í viðtøkunum fyri grunnin Spinnaríið / *Grunnurin er sjálvsognarstovnur, sum verður stjórnaður av eini nevnd, ið telur tríggjar limir, og sum verður vald sambært hesari viðtøku. Nevndarlimirnir verða valdir fyri eitt 4 ára tíðarskeið hvørja ferð og kunnu verða afturvaldir. Nevndin verður vald soleiðis: Klaksvíkar Handverkarafelag velur ein lim, Ferðavinnan í Norðoyggjum velur ein lim, og Klaksvíkar kommuna velur ein lim. Haraftrat fáa báðir leigararnir í húsinum, Knitting Faroes Sp/f og bátasavnið Samognin, hvør sín lim í nevndina, galdandi í tvey ár fram* (samtykt í býráðnum 27. sept. 2011)*, tá ið hesir báðir nevndarsessirnir fella burtur.*

Tilmæli: veljast skal 1 umboð

Samtykt: Heri Ellingsgaard

Tilbúgvingarnevndin
Heimild: Ll. 61, 2012, §12, stk. 5 Tilbúgvingarlógin / *Kommunur, sum eru felags um kommunala tilbúgving, skulu hava felags Tilbúgvingarnevnd og felags tilbúgvingarleiðara. Í felags Tilbúgvingarnevndini situr ein meiriluti, sum kommunustýrini tilnevna, felags tilbúgvingarleiðarin og eitt umboð fyri Føroya Landfúta. Borgarstjóri er formaður.*

Heimild: Samstarvsavtala um tilbúgving, 30-12-2020, pkt. 3.1 Manning og 3.2 Skipan av felags tilbúgvingarnevndini / *Felags tilbúgvingarnevnin hevur 7 limir. Borgarstjórarnir í teimum fimm samstarvskommununum eru fastir limir í nevndini (kommunustýrini staðfesta hesa tilnevning eftir hvørt kommunuval) umframt felag tilbúgvingarleiðarin og eitt umboð fyri Føroya Landfúta. / Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu er fastur formaður í nevndini. Harumframt skipar nevndin seg sjálv við næstformanni, ið eisini skal vera borgarstjóri.*

Tilmæli: sessur borgarstjórans í nevndini skal staðfestast

Samtykt: Sessur borgarstjórans, Karl H. Johansen, í nevndini staðfestur

SEV
Heimild: 4. grein, stk. 1-3 í viðtøkunum fyri SEV / Stk. 1, *Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd sambært stk. 2.* Stk. 2. *Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim. Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi. Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur.* Stk. 3. *Tá ið nevndarlimur verður valdur, skal eisini veljast varalimur, ið tekur við, tá nevndarliminum berst frá. Nevndarlimurin boðar varaliminum og SEV frá, tá honum berst frá.*

Tilmæli: veljast skal 1 nevndarlimavalevni og 1 tiltakslimavalevni

Samtykt: Nevndarlimavalevni: Oddmar á Lakjuni – Tiltakslimavalevni: Atli S. Justinussen

IRF
Heimild: 14. grein í viðtøkunum fyri IRF / *Í nevndina verða valdir seks limir, ið eru kommunustýrislimir, og sita fyri eitt valskeið ísenn og verða valdir eftir hesum reglum: * Limakommunurnar í Norðoyggjum velja ein, * ... Tiltakslimur verður valdur sambært stk. 2, og tekur hesin sæti í nevndini, tá einum nevndarlimi berst frá.*

Tilmæli: veljast skal 1 limur og 1 tiltakslimur

Samtykt: Limur: Gunvá við Keldu – Tiltakslimur: Annika S. Biskopstø

Kommunufelag Føroya
Heimild: Viðtøkur fyri Kommunufelagið samtyktar á stovnandi aðalfundi 13. desember 2013 / § 5. *Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.* Stk. 2. *Borgarstjórin umboðar kommunustýrið til at taka avgerð á aðalfundinum. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta. /* § 7. *Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við 13 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn. Stýrislimur skal vera borgarstjóri.* Stk. 2. *Stýrið tekur við 1. januar eftir kommunustýrisval og verður stýrið valt eftir hesi skipan: * Norðuroyggjar (Klaksvík, Hvannasund, Viðareiði, Húsa k., Kunoy og Fugloy) **1** lim., * ..., * ..., Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um at velja ein stýrislim. Semjast kommunurnar ikki um umboðanina, verður borgarstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.* Stk. 5. *Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.*

Tilmæli: sessur borgarstjórans skal staðfestast.

Samtykt: Sessur borgarstjórans, Karl H. Johansen, í stýrinum staðfestur

Grindaformenn fyri Klaksvíkar hvalvág
Heimild: Býráðið skal bert tilmæla sýslumanninum í Norðoya sýslu at uppnevna 4 grindaformenn og 2 tiltaksmenn

Tilmæli: tilmælast skal uppnevning av 4 grindaformonnum og 2 tiltaksmonnum

Samtykt: Einmælt samtykt at tilmæla sýslumanninum at uppnevna Óla Karl Olsen, Louis Juliusson, Dan Hjelm og Jógvan Z. Dahl sum grindaformenn, og Jaspur Isaksen og Jóhannus á Forunum sum tiltaksmenn.

4/21
21/00009-1 Heilsunevnd fyri valskeiðið 2021-2024 – E&B og UBN – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.01.2021	8/21
2 Havna- og Vinnunevndin	18.01.2021	5/21
3 Mentanarnevndin	19.01.2021	7/21
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.01.2021	9/21
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	19.01.2021	5/21
6 Tekniska Nevnd	20.01.2021	5/21
7 Fíggjarnevndin	26.01.2021	4/21

8 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	4/21
9 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	

21/00009-1 Heilsunevnd fyri valskeiðið 2021-2024 – TrN E&B og UBN

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 12. jan. 2021.

Í stuttum snýr málið seg um, at nýggi meirilutin í Klaksvíkar býráð hevur avtalað at seta á stovn eina nýggja Heilsunevnd, sum verður undirnevnd hjá Trivnaðarnevndini eldri og bústaðir (TrN E&B) og hjá Umhvørvis- og býarskipanarnevndini (UBN).

Yvirskipaða endamálið og uppgávan hjá Heilsunevndini verður henda:

> Heilsunevndin skal skapa góðar vanar og heilsufremjandi átøk fyri allar borgarar í Klaksvíkar kommunu.
> Nevndin skal í so stóran mun, sum tilber, brúka serkøn, sum búgva í kommununi, at hjálpa og viðvirka til at føra verkætlanirnar á mál.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 36, ”Aðrar nevndir og umboðan”
Kommunustýrisskipanin, § 25 ”Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir”

Arbeiðsháttur/mannagongd:
Sum “ráðgevandi nevnd, eykanevnd og ”undirnevnd” fær Heilsunevndin ikki heimild til at senda tilmæli beinleiðis til býráðið, so sum tær føstu nevndirnar hava, men nevndin verður at senda síni tilmæli til ta føstu nevndina, sum varðar av viðkomandi máli sambært kommunustýrisskipanini.

Forkvinnurnar í E&B og UBN verða ávíkavist forkvinna og limur í Heilsunevndini.

Ein aðalmunur á føstu nevndunum og eykanevndunum er, at hesar seinnu kunnu hava aðrar limir enn bert býráðslimir. Í hesum føri er ætlanin at halda seg til býráðslimir, har umboðini fyri meirilutan í býráðnum verða Annika S. Biskopstø, forkvinna í E&B, og Gunvá við Keldu, forkvinna í UBN.
Eftir lutfalsvalháttinum gevur mandatbýti í býráðnum meirilutanum fyrst valda limin (ASB), síðan fær minnilutin tann næsta limin, og so fær meirilutin tann triðja limin (GvK) millum býráðslimirnar.

Frágreiðing um málið: (framhald)
Uppskot til nýggja grein í kommunustýrisskipanini
Tá nýggjar nevndir skulu veljast, verður hetta skrásett í kommunustýrisskipan býráðsins.

Niðanfyri standandi uppskot til broyting í kommunustýrisskipan kommununnar verður tí við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið í januar fundarumfarinum, soleiðis at Heilsunevndin kann verða vald á býráðsfundinum í januar saman við øðrum nevndum, ráðum og stýrum, sum býráðið skal velja umboð í.

Her skal tó viðmerkjast, at § 5 í kommunustýrislógini ásetur, at ”*... uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili*”, so formliga fær henda ætlaða broyting tó ikki gildi fyrr enn eftir annan býráðsfundin, sum verður í februar.

Mælt verður kortini til at velja nevndina á býráðsfundinum í januar mánað, tá ið fyrra samtyktin av hesum tilmæli ætlandi er gjørd.

HEILSUNEVNDIN
Nýggj § 43 (undir *6. partur, aðrar nevndir*)

1. petti. Heilsunevndin er ein faknevnd innan partar av málsøkjunum hjá Trivnaðarnevndini eldri & bústaðir (TrN E&B) og hjá Umhvørvis- og býarskipanarnevndini (UBN). Nevndin er mannað við trimum býráðslimum og verður vald á fyrsta býráðsfundi eftir hvørt býráðsval.

2. petti. Sum undirnevnd hjá býráðsnevndunum TrN E&B og UBN hevur Heilsunevndin tær í pettunum 3, 4 og 5 útgreinaðu heimildir.

3. petti. Tilmælandi virkisøki og heimildir: Innan fylgjandi uppgávur og virkisøki hevur Heilsunevndin tilmælandi heimildir, tvs. hesi mál skulu leggjast fyri Heilsunevndina, sum tá hevur avmarkaða heimild og er tilmælandi yvir fyri avvarðandi býráðsnevnd:

Innan málsøkið hjá TrN E&B – heilsulig viðurskifti:
Mál um:
- Matarskipan til øll børn
- Upplýsandi tilfar og samanhald
- Uttandura venjingar- og vælveruøki
- Virkin sum longst

Innan málsøkið hjá UBN – umhvørvislig viðurskifti:
Mál um:
- Fleiri trø í býarrúminum
- Sniðgøtur, gongubreytir og súkklubreytir
- Órudd, ljóð- og ljósdálking minkar um trivaðin
- Umhvørvið skal hugsast inn í okkara politikk

4. petti. Sjálvstøðug virkisøki og heimildir: Um avvarðandi býráðsnevnd ítøkiliga samtykkir tað, kann Heilsunevndin fáa sjálvstøðugar heimildir innan tey undir 3. petti nevndu málsøki, tvs. hesi mál skulu leggjast fyri Heilsunevndina, sum tá hevur fulla heimild og kann sjálvstøðugt fremja í verki samtyktir innan hesi, treytað av, at játtan er tøk til tær útreiðslur, ið standast av teimum.

5. petti. Fíggjarligar heimildir: Heilsunevndin fær við hesum formliga heimild frá býráðsnevndunum E&B og UBN til at disponera fíggjarliga innan tær til eina og hvørja tíð galdandi játtanir á fíggjarætlan býráðsins, sum hesar býráðsnevndir geva heimild til.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at seta á stovn Heilsunevndina sum nýggja undirnevnd hjá trivnaðarnevndini Eldri og Bústaðir og Umhvørvis- og Býarskipanarnevndini eftir tí í hesum tilmæli útgreinaða leisti, og at kommunustýrisskipan kommununnar verður broytt samsvarandi hesum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. januar 2021:
Ein meiriluti, GvK, OáL og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-01-2021.
Ein minniluti, JS og SVJ, mælir til, at Heilsunevndin verður ein sjálvstøðug nevnd við egnari játtan, har m.a. *Sjóhitin* verður lagdur í.

Havna- og Vinnunevndin 18. januar 2021:
Ein meiriluti, ASJ, EÓP, OáL og AJ, tekur undir við meirilutanum í UBN, dagf. 18-01-2021

Ein minniluti, TJL, tekur undir við minnilutanum í UBN, dagf. 18-01-2021.

Mentanarnevndin 19. januar 2021:
Ein meiriluti, JCC, ASB og GvK, tekur undir við meirilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021.
Ein minniluti, SVJ, tekur undir við minnilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021.
Ein annar minniluti, ADJ, tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. januar 2021:
Ein meiriluti í nevndini, Eyðstein Ó. Poulsen, Jóhanna Christiansen og Annika Biskopstø, tekur undir við meirilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021 og MeN 19-01-2021.
Ein minniluti í nevndini, Tummas J. Lervig og Jógvan Skorheim, tekur undir við minnilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021 og minnilutanum SVJ í MeN.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. januar 2021:
Ein meiriluti í nevndini, Annika Biskopstø, Jóhanna Christiansen og Gunvá við Keldu, tekur undir við meirilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021, MeN 19-01-2021 og TrN B&U 19-01-2021.
Ein minniluti í nevndini, Signhild V. Johannesen, tekur undir við minnilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021, minnilutanum Signhild V. Johannesen í MeN og minnilutanum í TrN B&U.
Ein minniluti í nevndini, Andreas Josephsen, tekur støðu í býráðnum.

Tekniska Nevnd 20. januar 2021:
Ein meiriluti, OáL, ASJ og EÓP, tekur undir við meirilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021, og MeN, B&U og E&B 19-01-2021.
Ein minniluti, TJL, tekur undir við minnilutunum í HaVN 18-01-2021 og B&U 19-01-2021.
Andreas D. Josephsen tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við minnilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Atkvøtt varð um minnilutauppskotini frá UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021; tey fullu við 4 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL og AJ) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB).

Síðani varð atkvøtt um meirilutauppskotini frá UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021; tey vórðu samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB), 0 atkvøðum ímóti, og 4 blonkum atkvøðum (JS, SVJ, TJL og AJ).

5/21
21/00152-1 Broyting í kommunustýrisskipanini - rakstrarstaðið "Frítíðarskúlin (Snjallabjalla)" flytast frá FíN til B&U – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.01.2021	3/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	5/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	

21/00152-1 Broyting í kommunustýrisskipan Klaksvíkar kommunu (jan./feb. 2021) - Rakstrarstaðið "Frítíðarskúlin (Snjallabjalla)" flytast frá FíN til B&U

Frágreiðing um málið:
Í seinastu býráðssetu (2017-2020) varð rakstrarstaðið *Frítíðarskúlin (Snjallabjalla)* flutt frá trivnaðarnevndini Børn og Ung til Fíggjarnevndina orsakað av ógegni nevndarforkvinnunnar í B&U.

Henda støða er nú broytt, at ógegni ikki krevur rakstrarstaðið at vera á øðrum øki enn tí, har tað natúrliga hoyrir heima. Tí verður mælt til at flyta rakstrarstaðið aftur til B&U.

Henda flyting av umsitingarøkjum hevur við sær eina broyting av kommunustýrisskipanini. Málið skal tí hava tvær viðgerðir í býráðnum.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at samtykkja hesa broyting av kommunustýrisskipanini og flyta rakstrarstaðið *Frítíðarskúlin (Snjallabjalla)* frá Fíggjarnevndini aftur til trivnaðarnevndina Børn og Ung.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

6/21
21/00037-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 797a til ummælis

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.01.2021	7/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	6/21

21/00037-2 Umsókn um sundurbýti av matr.nr. 797a til ummælis

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um býráðsins ummæli til sundurbýti av matr.nr. 797a. Endamálið er bústaðabygging.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til sundurbýtið:
Talan er um umskipan innan økispart A8 – útlagt til blandað íbúðar- og miðstaðarendamál.
Umsóknin er í tráð við hesa áseting.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá UBN 18. januar 2021 einmælt samtykt.

7/21
17/00520-24 Dagføring av spæliplássinum við Kráargøtu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	19.01.2021	3/21
2 Fíggjarnevndin	26.01.2021	7/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	7/21

17/00520-24 Dagføring av spæliplássinum við Kráargøtu

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 13. jan. 2021.
Í oktober-umfarinum 2020 varð samtykt at taka av tilboði frá Innsport viðvíkjandi dagføring av spæliplássinum við Kráargøtu.

Saman við tilboðnum var eisini gjørt eitt uppskot, har gummi verður lagt á alt økið heldur enn bara at leggja gummiundirlag rundan um leikurnar. Hetta hevur við sær, at økið kann fáa mynstur og so framvegis, sum er við til at gera gummiið sjálvt til eina leiku eisini.
Innsport hevur staðfest, at tey fram til endan av januar standa við tilboðið um víðkaða økið.
Verður støða tikin til at víðka økið við gummiundirlagi, so dýrkar tað hesa verkætlanina.

Fíggjarligar avleiðingar:
2 mió. kr. eru settar til spælipláss íløgur á verandi fíggjarætlan, og tað er í løtuni ikki greitt, um bæði graslíkivøllur í Árnafirði og verkætlanin við spæliøki og parkeringsplássi í Ánunum kunnu rúmast innanfyri játtanina í ár, um kostnaðurin av hesum spæliplássinum fer frá kr. 461.890 til kr. 746.848. Sostatt kann henda, at ein betran av hesum spæliplássinum hevur neiligar avleiðingar fyri hinar verkætlanirnar, um arbeiðsorka fæst til at fremja tær í ár.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við dýraru loysnini, tá hetta samlað sæð er betra loysnin fyri hetta spæliplássið, sum longu er sett í gongd, samstundis sum tað í samband við eina dagføring av fíggjarætlanini verður tikin hædd fyri vøllinum í Árnafirði og spæliplássinum og vøllinum við Edmundstrød.

Mentanarnevndin 19. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-01-2021. Nevndin mælir til, at vøllurin í Mylnutúni verður gjørdur liðugur, síðani verður farið í holt við arbeiðið í Árnafirði, og hareftir verður farið í holt við Edmundstrød.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 19-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

8/21
20/00840-79 Flyta játtan til stuðulskonturnar á trivnaðarøkinum – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.01.2021	4/21
2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	19.01.2021	4/21
3 Fíggjarnevndin	26.01.2021	5/21
4 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	8/21
5 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	

20/00840-79 Flyta játtan til stuðulskonturnar á trivnaðarøkinum - Fíggjarætlan og roknskapur 2021 - Klaksvíkar Býráð

Frágreiðing um málið:
Víst verður til nærri útgreinandi skriv frá umsitingini, dagf. 27. des. 2020.

Í fíggjarætlan býráðsins fyri 2021 er tað hent av misgáum, at B&U bert hevur 25.000 kr. játtaðar til ymiskan stuðul, meðan E&B hevur 50.000 kr. játtaðar til endamálið. Hesar upphæddir eru vanliga í minsta lagi 50.000 kr. pr. trivnaðarnevnd, og seinastu árini hava tær verið enn hægri.
Orsøkin til mistakið er, at játtanir blivu spardar og fluttar í seinastu løtu í viðgerðini, og tá var umsitingin ikki varug við hesar manglandi játtanir.

Lógargrundarlag:
Talan er um virksemi í tráð við kommunulógina og kommunufulltrúina.

Fíggjarligar avleiðingar:
Mett verður, at játtanin til rakstrarstaðið "kommunulæknar" kann bera eina skerjing av játtan síni til hesa flyting millum kontur:

Rakstrarstað	**Standardkonta**	**Núv. játtan**	***Broyting***	**Nýggj játtan**
02202270020 Kommunulæknar	161000 Húsaleiga	140.000 kr.	*-25.000 kr.*	115.000 kr.
02211270030 Ymiskur stuðul almanna/heilsu	146980 Keyp av vørum annars	25.000 kr.	*+25.000 kr.*	50.000 kr.
	Tvs. netto broyting (útreiðsluneutral):		*0 kr.*	

Tilmæli:
Mælt verður nevndunum til at taka undir við hesi flyting millum kontur, soleiðis at báðar trivnaðarnevndir fáa somu játtan, 50.000 kr., til ymiskan stuðul.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 27-12-2020. Jógvan Skorheim luttók ikki í samtyktini.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. januar 2021:
Nevndin tekur undir við TrN B&U 19-01-2021

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við E&B 19-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

9/21
17/01446-7 Talgildu Føroyar - Klaksvíkar kommuna gerast samstarvsfelagi? – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.01.2021	8/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	9/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	

17/01446-7 Talgildu Føroyar - Klaksvíkar kommuna gerast samstarvsfelagi?

Frágreiðing um málið:
Málið er nærri útgreinað í skrivi frá umsitingini, dagf. 20. jan. 2021.

Umboð fyri Talgildu Føroyar og FMR hava vent sær til Klaksvíkar kommunu fyri at vita, um kommunan er áhugað í at gerast ein samstarvsfelagi í verkætlanini á sama hátt eins og aðrar kommunur.

Lagt varð upp til, at allar kommunurnar rinda lutfalsliga. Roknað varð við einum gjaldi á 173 kr. fyri hvønn borgara pr. ár í tíðarskeiðinum 2018-2020, við fólkatalinum pr. 1. feb. 2016 sum grundarlag. Fyri Klaksvíkar kommunu var tí talan um 2,575 mió. kr. ella 858 tús. kr. pr. ár. Hetta merkir, at um avtalan varð fylgd frá byrjan, hevði seinasta galdið fallið til gjaldingar í fjør.

Av tí at tað eru tvey ár eftir av verkætlanarskeiðnum, kann galdið rindast í einum ella yvir tvey ár.

Samanumtikið verður mett, at Klaksvíkar kommuna eigur at vera partur av tilgongdini, at menna Talgildu Føroyar. Uttan iva verða fleiri skipanir hjá kommununi knýttar at skipanini framyvir.

Lógargrundarlag:
Kommunala lóggávan

Fíggjarligar avleiðingar:
Kostnaður 2,575 mió.kr. ið kann rindast í einum ella 1.287.500 kr. í 2021 og 2022.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur undir við, at Klaksvíkar kommuna ger avtalu við Talgildu Føroyar um samstarv at menna skipanina.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-01-2021, og at goldið verður yvir tvey ár. Fíggingin verður at avgreiða við eykajáttan.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

10/21
20/01234-10 Treytað tilsøgn um leigusáttmála til íbúðabygging í miðbýnum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.01.2021	4/21
2 Fíggjarnevndin	26.01.2021	6/21
3 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	10/21

20/01234-10 Treytað tilsøgn um leigusáttmála til íbúðabygging í miðbýnum

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 13. jan. 2021, ið greiðir gjøllari frá málinum.

Býráðið viðgjørdi undan ársskiftinum umsókn frá samtaki um leigu av lendi í miðbýnum til íbúðabygging. Býráðið fegnaðist um áhugan at byggja íbúðir í miðbýnum og tók í høvuðsheitinum undir við málinum, men ynskti at fáa málið nágreinað betur í mun til formlig viðurskiftir.

Útgreinandi samskifti hevur síðani verið við umboð vegna samtakið, og er ynski teirra at fáa eina tilsøgn um leigusáttmála til íbúðabyggingina. Talan er annars um eina fult privata verkætlan, ið kommunan ikki skal hava nakran leiklut í.

Fyrisitingin kann mæla til, at samtakið kann fáa eina treytaða tilsøgn um leigusáttmála við teirri treyt, at hon stendur við í 18 mánaðir.

Uppskot til treytaða tilsøgn:

Klaksvíkar kommuna er sinnað at veita samtakinum treytaða tilsøgn upp á leigusáttmála til undirlendi til íbúðabygging í miðbýnum við fylgjandi treytum:

- Leigusáttmálin verður at galda fyri 29 ár og 11 mánaðir við møguleika fyri leingjan av leigutíðarskeiðinum
- Bygningurin skal lúka øll myndugleikakrøv og ásetingar fyri økið
- Byggingin skal verða í tráð við "*Designmanual Klaksvíkar kommuna, september 2015*"
- Tilsøgnin gongur út 18 mánaðir frá dagfestingini av hesum brævi. Um fyrireikingin av verkætlanini ikki liðug innan 18 mánaðir, fellur tilsøgnin burtur.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Sjálv verkætlanin hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa. Men í samband við parkering í økinum kann væntast, at kommunan má inn at gera fleiri parkeringspláss, tí miðbýarøkið veksur, og er hetta mett at koma at kosta miðbýarverkætlanini einar 600 tús.kr. aftrat.

Tilmæli:
Mælt verður til, at tikið verður undir við at veita samtakinum eina 18 mánaða treytaða tilsøgn upp á leigulendi í miðbýnum, sum lýst í frágreiðingini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 13-01-2021.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 18-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

11/21
18/00023-1 Umfígging (avtala um afturgjalding, januar 2021)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.01.2021	9/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	11/21

18/00023-1 Umfígging (avtala um afturgjalding, januar 2021)

Frágreiðing um málið:
Víst verður til útgreinandi skriv frá umsitingini, dagf. 20. jan. 2021.

Kommunan skal gera avtalu við Norðoya Sparikassa um afturgjalding av láni, sum fellur til gjaldingar 29. januar; hetta er lán, sum kommunan hevur tikið árini 2017-2019 ísbv. umfígging. Hetta kemst av, at avdráttarprofilurin á lánunum hjá kommununi er størri enn tað, sum er avsett á fíggjarætlanini. Við umfíggingini kemur niðurgjaldingin av skuldini at samsvara við avsetingina í fíggjarætlanini.

Lánið er til skiftandi rentu, har rentan í løtuni er 0,65%. Við seinastu hækkingini í desember 2019 varð avtalað, at lánið skuldi verða avdráttarfrítt til 29. januar 2021, tá avtala skuldi gerast um afturgjalding. Umsitingin mælir til, at lánið verður afturgoldið yvir 15 ár, og at rentan verður skiftandi.
Nú lánið fer frá at verða avdráttarfrítt til at verða annuitetslán, hækka árligu lánsútreiðslurnar.

Einki er sett av á fíggjarætlanini til avdráttir, og tí verður neyðugt at umfíggja lánsgjaldið, fyri at fáa javnvág millum avsetingina í fíggjarætlanini og niðurgjalding av skuldini.

Lógargrundarlag:
§ 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Nú lánið fer frá at verða avdráttarfrítt til at verða annuitetslán, hækka árligu lánsútreiðslurnar við kr. 1.606.500.

Áður rindaðu vit rentur kr. 193.500 árliga, men nú verður árliga gjaldið kr. 1.800.000 (= 150.000*12)
Munurin er kr. 1.606.500.

Við hesum hækka árligu avdráttirnir úr 7,5 mió. kr. til 9,1 mió. kr.

Neyðugt verður at umfíggjað upphæddina, tí einki er sett av á fíggjarætlanini til avdráttir.

Tilmæli:
Mælt verður til, at afturgjaldstíðin á láninum verður 15 ár, og at rentan verður skiftandi.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.